## Minniligir dagar á bygd



Í kvøld fara Theodor Hansen og Heini F. Petersen at halda fyrilestur í bygdarhúsinum við Gjógv.

»Minniligir dagar á bygd«.

Tað er heitið á fyrilestri, sum Theodor Hansen og Heini F. Petersen fara at halda í bygdarhúsinum við Gjógv í annaðkvøld klokkan 20.

Theodor og Heini hava ein sera lættan frásøguhátt, so einki er at ivast í, at hetta verður ein spennandi og hugtakandi løta.

Í fyrilestrinum fara teir báðir at hugleiða um gerandisdagin á bygd fyrr í tíðini.

# Møtir og kunning um bíbliuskúla

**BÍBLIUSKÚLI**

**Týskvøldið, mikukvøldið og hóskvøldið fer bíbliuskúlalærari at halda møtir og kunna um bíbliuskúlan í Børkop**



Vilmund Jacobsen

Lagt verur fyri á Strondum, síðan í Klaksvík - og at enda verður møti og kunning í Havn.

Frá týsdegnum 15. mars til fríggjadagin 18. mars vitjar Peder Kølle frá Indre Missións bíbliuskúlanum í Børkop, vanliga nevndur IMB.

Peder Kølle hevur verið lærari á IMB síðani 1996, har hann eitt nú undirvísir í rómverjabrævinum, evangeliunum, trúðarverju og prædikulæru.

Sagt verður um mannin, at hann er ein dugnaligur og spennandi undirvísari. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti, sjálvt um tey serliga eru vend móti ungdóminum.

Fyrireikararnir til møtini og kunningina um bíbliuskúlan vísa á, at nógvir føroyingar hava gingið á IMB og hava verið sera glaðir fyri tíðina.

– Peder vónar at síggja fleiri fyrrverandi og ikki minst fleiri komandi næmingar, verður sagt í tíðindaskrivi.

Á hvørjum 5 mánaðar skeiði, sum byrja í august og í januar, verður skipað fyri eini uttanlandsferð í umleið 10 dagar. Um várið gongur leiðin til Etiopia og um heystið til Ísraels.

Um hetta kann lesast á heimasíðuni: www.imb.dk

Fyrireikararnir siga, at Peder Kølle kemur at hava møtir og kunning um bíbliuskúlan á trimum ymiskum støðum, nevniliga í Stranda missiónshúsi týsdagin 15. mars, í KFUM/K í Klaksvík mikudagin 16. mars og í Meinigheitshúsinum í Havn hósdagin 17. mars.

Lagt verður fyri á øllum støðum klokkan 20.

## Gunnvør á Norði vart Ph.D.-ritgerð

Seinnapartin 11. mars vardi Gunnvør á Norði ritgerð sína »Impact of organic enrichment on the sediment biogeochemistry and overlying water quality in relation to fish farms in Faroese fjords«, og kann nú seta PhD-heitið aftan fyri navnið hjá sær.

Ritgerðin hjá Gunnvør á Norði byggir á mátingar, sum hon hevur gjørt á Kalbaksfirði í góðum samstarvi við starvsfólkum hjá alifelagnum p/f Týggjará. Gunnvør hevur havt starvsstað á Havstovuni, og hevur verið innskrivað sum lesandi á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Verjan var í hølunum á Vinnuháskúlanum. Fyrst legði Gunnvør fram ein samandrátt av 100 síðu longu ritgerðini, og aftaná svaraði hon spurningum frá andmælingunum. Verjan gekk væl og dómsnevndin ivast ikki í, at arbeiðið hjá Gunnvør á Norði væl og virðiliga var nøktandi til PhD heiti. Í dómsnevndini sótu Dr. Marianne Holmer, biogeokemikari, Instituttleiðari á Syddansk Universitet, Dr. Kenny D. Black, leiðari á Økologi deildini á The Schottish Association for Marine Sciences og Dr. Høgni Debes, lívfrøðingur á Havstovuni og atknýttur lektari á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

## Afturval í fakfelag

Bæði Anna Lisa Davidsen og Marjun í Gong vórðu afturvaldar í nevndina í Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum hevur havt aðalfund í dag.

Tær báðar stóðu fyri vali hesaferð, so har gjørdist eingin nevndarbroyting. Til varalimir í felagnum vórðu valdar Ruth Boetius og Evida Jane Bruce. Kjarta Jacobsen, sum hevur verið varalimur, bar seg undan afturvali.

Nevndin er nú henda:

Vigdis Johannesen forkvinna

Anne Lisa Davidsen, næstforkvinna

Marjun í Gong skrivari

Mariann Højgaard nevndarlimur

Ada Bisp nevndarlimur

Varalimir eru:

Ruth Boetius

Evida Jane Bruce



## Um burðardygga menning í Suðuroy

Agenda 21 Stovan skipar fyri ráðstevnu á Hotel Øravík leygardagin hin 2.apríl har lýstar verða verkætlanir, ið kunnu stuðla undir einari burðardyggari menning fyri Suðuroy.

Fýra megin evni verða lýst og eru hesi ferðavinna, landbúnaður, aling og orka. Afturat hesum verður greitt frá um fyriskipandi lóggávu og ásetingar, ið kunnu hava týdning tá ætlanir og virksemi skal skipast innan nevndu evni.

Ráðstevnan verður skipað við 8 fyrilestrum og endar við verkstaðum har gjørd verða tilmæli til ítøkiligar verkætlanir mettar verða skilagóðar í burðardyggari menningarætlan.

Ráðstevnan er fyrst og fremst ætlað kommunustýrislimum í Suðuroy og starvsfólkum innan umsiting kommununar. Eitt avmarkað pláss verður til áhugaði í oynni annars.

Í stuttum kann sigast at framløgurnar koma at snúgva seg um menningarætlanir innan ferðavinnu, landbúnað og skeljaaling, og innan varandi loysnir til orkuframleiðslu innan hita og ravmagn. Serstak kann nevnast "Pump Storage" verkætlan, ið vísir hvussu Suðuroyggin kann gerast sjálvbjargin innan ravmagnsveiting.


Cammilla Rysgaard

Við hvørt stúra vit ov nógv. Hugsa negativar tankar. Gloyma okkara dreymar og missa lívsgleðina. Men hvat gera vit, tá ið tíðin rennir undan okkum, og vit ikki merkja okkara dreymar ella eru trúgv ímóti okkum sjálvum. Rithøvundin Cammilla Rysgaard gevur góð ráð um, hvussu vit kunnu fáa størri sjálvsálit, styrkja sjálvsvirðið og hugsa positivar tankar um okkum sjálvi.



hvonn ★★★★★ LIVE

Leygarkvøldið 19. mars kl. 20

2 Rás títt radio

Royal hárfríðkan

Coca-Cola

Atlantic Airways

Carlsberg

Sosialurin 341800